# Føroyskir unglingar í altjóða sýnisgluggan

*Fleiri fótbóltsumboðsmenn fara at fylgja við føroyska U–18 fótbóltslandsliðnum, sum komandi dagarnar fer at spæla tríggjar dystir í Italia*

Stór og kend fótbóltsfeløg hava skrivað sær aftanfyri oyrað, at føroyskir unglingar ikki bara hava hug at spæla fótbólt, men at teir eisini hava hegni og áræði á fótbóltsvøllinum. Tað var sjón fyri søgn, tá U–16 landsliðið í síðstu viku var í Hollandi og spældi tríggjar dystir í EM undankappingini, og tað verður aftur staðfest, tá U-18 unglingarnir komandi dagarnar fara at taka lut í EM undankappingarbólki í Italia.

– Umboðsmenninir keypa sjálvandi ikki spælarar ígjøgnum Fótbóltssambandið, og tað er ikki uppgávan hjá FSF at selja spælarar, men umboðsmenninir seta seg í samband við okkum, tá vit eru aðra staðni og taka lut í kappingum. Sjálvt um úrslitini ikki altíð eru so góð, so er tað hugaligt at fáa at vita frá teimum, at teir hava lagt til merkis, at føroysku liðini spæla fótbólt upp á ein máta, sum teimum líkar væl. Tí er tað, at teir eru áhugaðir í fleiri av spælarunum.

Hetta sigur Jógvan Martin Olsen. Hann er venjari hjá U–18 landsliðnum, sum í gjár fór av landinum. Málið er Italia, har liðið skal spæla í EM undankapping. Fyrsti dysturin verður ímóti Italia í morgin, annar dysturin verður ímóti Onglandi mánadagin, og triði dysturin verður ímóti Andorra mikudagin í komandi viku. Ferðalagið kemur aftur til Føroya hósdagin seinnapartin.

### Fleiri út at ferðast

At tað ikki er einki í tíðindunum um, at útlendskir umboðsmenn og útlendsk fótbóltsfeløg eru áhugað í føroyskum spælarum, eru tað ítøkilig prógv fyri.

Tá landsliðið um eina viku verður á veg til hús aftur fara tveir spælarar aðra leið úr Keypmannahavn enn til Føroya. Jann Ingi Petersen úr B68 og Jón Rói Jacobsen úr HB koma ikk heim við. Jann Ingi Petersen skal til PSV Eindhoven í Hollandi at royndarvenja, og Jón Rói Jacobsen skal til Liverpool í Onglandi í somu ørindum.

Og tað er líkt til, at aðrir spælarar standa í svørtu lummabókunum ymsa staðni í Europa:

– Eg veit um fleiri umboðsmenn, sum vera í Italia í sambandi við kappingina. Teir fara sjálvandi at hyggja at italsku og eingilsku spælarunum, men eg veit, at teir eisini kenna og fylgja við føroysku spælarunum, sigur Jógvan Martin Olsen.

Í fyrradagin fekk FSF enn eina áminning um, at útlendsk feløg fylgja føroysku unglingunum. Derby, sum spælir í bestu deildini í Onglandi, boðaði í telefaksi FSF skrivstovuni frá, at teir ætlaðu sær at senda ein umboðsmann til Italia við tí fyri eyga at hyggja at føroysku spælarunum.



Jón Rói er ein av leikarunum á føroyska U-18 landsliðnum

### Ferðalagið

Føroysku unglingarnir, sum nú eru í Italia, og sum í morgin, mánadagin og mikudagin fara at standa í altjóða fótbóltssýnisgluggaanum, eru átjan í tali. Venjari hjá teimum er Jógvan Martin Olsen, og Mattias Davidsen er hjálparvenjari. Hann hevði ábyrgdina av U–16 landsliðnum, sum í síðstu viku var í Hollandi.

Pól N. Joensen, B36 og Karstin Joensen, KÍ, eru málverjar. Útispælararnir eru Atli Gregersen, Randers Freja, Jón Rói Jacobsen, HB, Vagnur Mohr Mortensen, HB, Áki Leitisstein Hansen, NSÍ, Brynjolvur Nielsen, NSÍ, Jann Ingi Petersen, B68, Elfinn Ørvarodd, FS Vágar, Ragnur Poulsen, B36, Atli Danielsen, KÍ, Hjalgrím Elttør, KÍ, Símun Joensen, KÍ, Niels Joensen, B36, Bergur Djurhuus, NSÍ, Bárður Christiansen, HB, Fróði Jóanesarson, NSÍ og Bjarni Jørgensen, HB.

**jh**

# Neistin væl frá byrjan

*Hóast KÍF legði seg væl framum eftir ta fyrstu løtuna, megnaðu neistamenn við Kára Mortensen á odda at vinna ein greiðan sigur*

Stefan í Skorini

Neistin vann sín fyrsta dyst í hesum kappingarárinum. Kollfirðingar vóru á vitjan í høllini á Hálsi, og hóast teir løgdu hart út, vísti Neistin seg at vera betra liðið. Serliga í seinna hálvleiki setti Neistin ferðina upp, og KÍF kláraði ikki at fylgja við. KÍF hevði annars eina greiða leiðslu við steðgin.

### Løgdu hart út

Kollfirðingar komu til Havnar fyri at vísa, at teir ætlaðu sær at vinna dystin. Teir løgdu sera hart út, og Neistin megnaði ikki at fylgja við ta fyrstu løtuna. Longu eftir tíggju minuttir hevði KÍF fingið eina leiðslu uppa seks mál. 7-1 var støðan. Tað sást á øllum brøgdum, at Neistin hevði ilt við at spæla upp við kollfirðingar.

Neistamenn gjørdu royndir at berja seg innaftur í dystin, men teir megnaðu ikki at minka munandi um leiðsluna. Liðini fylgdust, tað sum eftir var av fyrra hálvleiki. KÍF hevði eina fimm málsleiðslu við steðgin. 16-11 til KÍF móti Neistanum.

### Neistamenn hamskiftir

Neistin legði út sum eitt ódnarveður eftir steðgin. Fimm bóltar fóru í málið hjá kollfirðingum, áðrenn KÍF slapp framat. Eftir tíggju minuttir stóð aftur á jøvnum, og tá hevði Neistin hálað eina leiðslu uppá fimm mál innaftur.

Eftir hetta dróg Neistin frá KÍF, sum als ikki megnaði at halda neistamenninar í tjóðri í seinna hálvleiki, eins og teir høvdu í fyrra. Móti endanum fall útiliðið heilt í fátt, og neistamenn sluppu at hóreiggja sær, sum teimum lysti. KÍF fekk bara seks mál eftir steðgin, meðan Neistin fekk nítjan.

Veteranurin Kári Mortensen kann vísa seg at vera ein av stuðulsleikarunum hjá Neistanum hetta kappingarárið. Hann gjørdi ellivu av teimum tredivu málunum. Útlendski leikarin hjá KÍF, Durica Tomic, var aftur hesuferð besti málskjútti við sjey málum. Hann var eisini besti málskjúttin ímóti VÍF um vikuskiftið.



Kári Mortensen

Hetta vóru annars tvey lið, sum væntandi ikki fara at gera seg galdandi í stríðnum um meistaraheitið í ár.

### Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Neistin: Kári Mortensen 11, Helgi Justinussen 5, Áki Mørk 4, Jakob Jónsson 4, Regin Didriksen 2, Rani Slættanes 2, Jákup Sverri Kass 2
KÍF: Durica Tomic 7, Jákup Dam 6, Petur M. Johansen 4, Eddi Joensen 3, Vagnur Johannesen 1, Petur Martin Poulsen 1

Útvísingar: KÍF 3

Dómarar úr Kyndli
Hans Thomassen og Hanus Kúrberg

# Russland til Jugoslavia flaggdagin

*Í russiskum fjølmiðlum hevur verið nevnt, at jugoslavar ætla at spæla ímóti Føroyum 16. august. Enn er einki frættum, nær HM undankappingardysturin ímóti Jugoslavia verður spældur. Kortini er tað nú greitt, at føroyska landsliðið fer ikki at halda flaggdagin í Beograd.*

Ivan Eginsson, altjóða fótbóltsserfrøðingurin, sum er búsitandi í Føroyum, veit at siga frá russiskum fjølmiðlum, at tað er avgjørt, at Russland skal spæla í Jugoslavia 25. apríl komandi ár. Hetta var ein av teimum trimum døgunum, ið vóru nevndir sum møguligir dystardagar, tá FIFA mánadagin gjørdi av, at dystirnir, sum Russland og Føroyar skuldu spæla í Jugoslavia ávikavíst komandi leygardag og mikudag, ikki kundu spælast nú.

– Í russiskum fjølmiðlum verður sagt, at tað vóru fýra dagar at velja ímillum. Umframt 15. november, 15. februar og 25. apríl, sum hava verið nevndir í vikuni, so siga teir í Russlandi, at 16. august eisini hevur verið upp á tal. Russarar vildu fegnir hava, at dysturin hjá teimum varð spældur 16. august, men tað vildu jugoslavar ikki, og so varð avrátt, at Russland skal spæla í Beograd 25. apríl, sigur Ivan Eginsson.

Sambært russiskar fjølmiðlar vóru jugoslavar ikki áhugaðir at spæla ímóti Russlandi 16. august av tveimum orsøkum.

Onnur var, at tá verður framvegis summarfrí í flestu landskappingunum í Europa. Tað vil siga, at jugoslavar rokna ikki við, at teirra spælarar fara at vera nóg væl fyri.

Hin orsøkin er – framvegis sambært russiskum fjølmiðlum – at jugoslavar siga seg ætla, at dysturin ímóti Føroyum skal vera mikudagin 16. august. Tað tykist sum um teir halda, at tað verður ikki neyðugt at vera í fullgóðari venjing, tá talan er um ein dyst ímóti Føroyum.

### Møguleikin ikki nevndur

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, er tann, sum vegna FSF samskiftir við FIFA. Tá vit bera honum tíðindini úr russiskum fjølmiðlum, sigur hann, at tað er nýtt fyri honum, at 16. august er ein møguligur dystardagur:

– Vit hava samskift við FIFA um útsetta dystin. Tað eru teir, sum hava boðað okkum frá, at tað er ikki ráðiligt at fara til Jugoslavia, og tað eru teir, sum leggja kappingina til rættis. Sjálvandi samskifta teir við jugoslavar, men higartil hava teir ikki borið okkum tíðindini um møguleikan at spæla 16. august, sigur Ísak Mikladal. Hann vísir samstundis á, at hetta er sami mikudagur, sum Føroyar í summar høvdu vitjan av danska landsliðnum, og tí kemur tað ikki óvart á hann, at hetta er ein møguligur dystardagur.

Í FSF vilja teir hava spurningin um dystardagin avgreiddan so skjótt, sum tað ber til. Teir skuldu tosa við FIFA í gjár, men tá vit frættu var einki avgjørt.

**jh**



# Fram í øllum góðum

*Ferðalagið við føroyska landsliðnum lendið í góðum floglíkindum í Zürich mikukvøldið*

Jákup Mørk/Álvur Haraldsen Zürich

Eitt sindur seinkað lendið flogfarið hjá Atlantic Airways í Zürich mikukvøldið. Floglíkindini vóru av teimum bestu, so ferðin úr Føroyum tók ikki meira enn á leið tríggjar tímar, men ferðslan á vøllinum var nógv, og tí varð flogið í ring eina løtu, áðrenn flogfarið kundi seta seg.

Komnir á flogvøllin gekk alt bæði skjótt og væl, og ikki gingu nógvir minuttir, fyrr enn leikarar, fjølmiðlafólk og áskoðarar kundu seta kós móti fyribils bústøðum sínum.



John Petersen hevur eitt sindur av pínu í knænum, men roknað verður tó við, at hann verður klárur leygardagin

### Spjadd

Føroyska ferðalagið er spjatt í trimum bólkum á ferðini.

Áskoðararnir og pressan búgva miðskeiðis í býnum, tó at talan er um tvey ymisk hotel, meðan leikararnir sjálvir búgvi í útjaðaranum av býnum. Har umframt er eisini bólkurin hjá 12.manni í Zürich í hesum døgum. Hesi eru komin umvegis Keypmannahavnar við bussi, og sum vit hava skilt tað, ætla teir báðir føroysku áskoðarabólkarnir at fyriskipa eitthvørt, nú upp undir dystin.

Hósmorgunin fór føroyska liðið so undir fyrstu venjingarnar, sum fóru fram á Dürbach Stadion, sum liggur í útjaðaranum av býnum.

Tað tók tó sína tíð at finna fram til hetta Dürbach Stadion. Eftir at hava fingið fráboðað tvey ymisk pláss, har venjingin skuldi fara fram, og eftir at hava koyrt runt í Zürich í trý korter, eydnaðist hetta tó endiliga. Tíbetur má sigast, at hýruvognsførarin var somikið blíður, at hann steðgaði skjóttgangandi taxametrinum eftir tað fyrsta korterið, so rokningin fyri túrin ikki gjørdist alt ov stór.

### Allir eru klárir

Venjingin sjálv tóktist ikki at vera av harðasta slagnum. Nakað av smábólti, so heimligu spælararnir aftur kundu venja seg við at hava rættiligt gras undir fótunum.

Tað var tó hugaligt at staðfesta, at eingir skaðar tykjast at gera um seg á føroyska liðnum. Liðformaðurin, Jens Kristian Hansen, er nakað eymur í lærkrikanum eftir eitt langt kappingarár, meðan John Petersen hevur nakað av trupulleikum við knænum.

Fyrrverandi landsliðsleikarin, Páll á Reynatúgvu, sum er annar av fysioterapeutunum á ferðini, metti tó ikki, at talan var um nakað álvarsmál, og líkt er tí til, at Allan Simonsen hevur allar mans tøkar, tá liðið skal setast.

Seinasta partin av venjingini varð spælt upp á tvey mál, og av hesum var líkt til, at uppstillingin longu er um at taka skap í høvdinum hjá venjaranum. Tað tóktist í øllum førum sum um, at nakrar av ætlaðu snildunum leygardagin vórðu royndar, og skal gitast um eina uppstilling, verður henda soleiðis: Jákup Mikkelsen – Hans Fróði Hansen, Óli Johannesen, Jens Kristian Hansen – Allan Mørkøre, Julian Johnsson, Sámal Joensen, John Petersen, Øssur Hansen – Kurt Mørkøre, Uni Arge.



Í góðan tíma vandu landsliðsleikarar okkara hósmorgunin. Fríggjadagin verður vant á Stadion



Tveir av føstu fúsunum á landsliðsferðunum, Mortan og Magnus hugnaðu sær eisini undir ferðini

# Fallin væl til

*Nýggi landsliðsmaðurin kennir seg bara heilt væl millum nýggju liðfelagarnar á landsliðnum*

Jákup Mørk/Álvur Haraldsen Zürich

Christian Høgni Jacobsen er annar av nýggju monnunum, sum eru á landsliðnum hesu ferð.

Sjálvur var hann heldur bilsin um, at hann nú hevur fingið møguleikan, tí hóast nakað av skriving hevur verið um NSÍ leikaran sum landsliðsevni, so trúi hann tí ikki rættiliga.

Nú hevur hann tó fingið møguleikan, og sjálvsagt vónar hann, at hann eisini kann fáa eina løtu á vøllinum leygardagin.

– Eg havi ikki fingið ábendingar um nakað sum helst frá landsliðsvenjaranum, men sjálvandi vóni eg, at eg sleppi á vøllin, sigur spælarin.

Um ferðina sjálva heldur hann annars, at hetta at venja við landsliðnum er sera hugaligt.'

– Sjálvandi er ferðin nógv hægri, enn man er vanur við, men alt tað skal nokk eisini ganga.

– Eg eri eisini fallin væl inn saman við hinum lekarunum í hópinum. Teir, sum spæla uttanlands, havi eg sjálvsagt ikki spælt ímóti, men heimligu leikararnar kenni eg eitt sindur frá landskappingini, so tað hevur avgjørt ikki verið nakar trupulleiki í so máta, sigur Christian Høgni Jacobsen at enda.



Nýggi landsliðsmaðurin roknar ikki við nøkrum, men vónar sjálvandi at koma á vøllin leygardagin

